Skála-B36 0-1 (0-0):

# Stigini vóru tað týdningarmesta

**B36 vísti eingi tekin um, at liðið er ávegis úr leikliga aldudalinum, men teir fingu trý sera kærkomin stig, tá teir mánakvøldið vitjaðu á Skála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Eingin karakterur varð latin fyri góðskuna á spælinum, men B36 fekk trý sera týdningarmikil stig við sær av Skála*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Krepputosið var av álvara farið at gera um seg í B36. Stjørnusetti hópurin, sum frá mest sum øllum síðum varð kosin sum størsti FM-favoritturin hevur als ikki havt nakað glið á spælinum enn. Úrtøkan hevur eisini verið hareftir, og tí var talan um sanna botnuppgerð, tá B36 mánakvøldið fór inn á Skála at spæla.

### Sannur botndystur

Botnuppgerðir eru í sjálvum sær týdningarmiklar og ikki minst truplar. Tí mest sum líka mikið, hvat felag talan er um í slíkum støðum, so ávirkar sálarliga trýstið aloftast, at leikarar gerast forkrampaðir, soleiðis at ilt er at fáa nakað samanhangandi spæl at koyra, og tíansheldur at skapa nakrar málmøguleikar.

Sæð soleiðis, so var einki at ivast í, at talan var um botnuppgerð. Sterkasta vápnið hjá Skála hevur hugartil í ár verið, at liðið er rættiliga væl skipað í verjupartinum, og tað var eisini fyrst og fremst hetta, sum hdenturin varð lagdur á mánadagin. Við at nýta ávíkavist Iulian Florescu og Petur Svavarsson í verjupartinum, var ætlanin ivaleyst eisini at styrkja um uppspælið, soleiðis at møguleikin fyri kvikum mótálopunum í størri mun skuldi verið til staðar, enn hann hevur verið tað higartil.

Tískil var tað ikki Skála – og tað var kanska heldur ikki væntandi – sum var spælstýrandi, men tað var hinvegin langt ífrá, at B36 var tað. Í eini roynd at styrkja um skapandi partin í spælinum hevði Ion Geolgau annars broytt uppstillingina nakað. Jens Kristian Hansen og John Petersen vóru at síggja á miðvøllinum, men tað var langt ífrá at hetta merkti so nógv. Jens Kristian er enn ikki komin nóg væl fyri seg eftir drúgva skaðasteðgin, meðan John fyri tað nógva tóktist rættiliga ómotiveraður. Nakað sum kanska júst er ein trupulleiki hjá stjørnusetta B36-liðnum, har stórur partur av leikarunum hava verið við til at vinna tað, sum vinnast kann í Føroyum, og tí kanska ikki eru til reiðar at ofra seg tey seinastu prosentini, sum ofta eru neyðug. Og í so máta styrkti tað avgjørt ikki um, at Jákup á Borg hetta kvøldið var burturstaddur í barnsburðarørindum.

Úrslitið av øllum hesum gjørdist, talan var um ein av teimum heilt linligu dystunum. Lítil ferð, illa umhugsað uppspæl, fáir mans niðan eftir vøllinum, og mest sum eingir mál-møguleikar.

Veruligu atsóknir í teimum 90 minuttunum kunnu helst teljast á einari hond, og talan var eisini um meira ella minni tilvildarliga roynd, tá forloysandi málið hjá B36 kom. Ein langur bóltur varð sendur úr høgru niðan í brotsteigin, og har var Heðin á Lakjuni hægri enn Eugen Voda í Skálamálinum, og við høvdinum stýrdi hann bóltin inn í manntóma málið.

Tað lá ongan tíð í luftini, at Skála skuldi koma afturíaftur. Beint eftir B36 málið varð Iulian Florescu rikin av vølli fyri at hava tikið beinini undan Julian Johnsson, og tað gjørdi sjálvandi ikki fortreytirnar hjá Skála betri. Einar tvær ferðir var tó vandi á ferð við deyðbóltsstøðum, men meira enn tað gjørdist talan ikki um, og tá B36 heldur ikki fekk stórvegis á skaftið, so kundi tað neyvan enda øðrvísi.

### Stigini telja

Fyri Skála merkir tapið, at teir framvegis eru niðastir á stigatalvuni við ongum stigi. Í sjálvum sær ikki nøkur nøktandi støða, men enn eru allar alarmklokkurnar tó ikki farnar at ringja. Hóast væntandi málini, so hevur spælið verið á eini leið, og enn hevur liðið at kallað bert leikt móti teimum, sum eru ætlað til eina topp-plasering.

Hjá B36 kundi sigurin ikki fjala, at liðið enn er í einum leikligum aldudali. Einki er tó at ivast í, at sigurin mundi kennast sum ein stór forloysing hjá teimum. Ikki minst tey trý stigini, sum hava við sær, at liðið nú næstan hevur samband upp til oddin.

At talan so ikki var um tað poleraða spælið hesaferð man koma í aðru røð í so máta. Nú hava leikarar og venjarar í øllum førum tryggjað sær arbeiðsfrið í tvær vikur, og til ta tíð fæst so at síggja, um betri olja er fingin á maskinuna ella ikki.

### Dysturin í tølum

**Skála-B36 0-1 (0-0)**
0-1: Heðin á Lakjuni
Dómari: Suni Johansen: Hevði ikki stórvegis trupulleikar at hava tamarhald á teimum fáu illstøðum, sum tóku seg upp.
Skála: Eugen Voda – Petur G. Svavarsson, Arnold Berg, Dusan Jaic, Iulian Florescu – Bogi Gregersen, Alexandar Jovevic, Pauli Hansen, Alexndur Johansen – Sveinur Justinussen, Jonhard Frederiksberg
B36: René Tórgarð - Allan Mørkøre, Fróði Clementsen, Pól Thorsteinsson, Rúni Elttør – Julian Johnsson, Klæmint Matras, John Petersen, Jens Kristian Hansen – Sonni Johansen, Heðin á Lakjuni

# Toppurin breiðari enn nakrantíð

**B36, sum higartil hevur verið botnlið og sum mánakvøldið vann fyri fyrstu ferð, kann skjótt gerast partur av stríðnum um fremstu plássini**

4. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

Tað kann ikki sigast annað, enn at støðutalvan er rættuliga sjáldsom. Eftir fýra tey fyrstu umførini eru helmingurin av liðunum oddalið.

Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 4 | 2 -2 -0 | 9 | 3 | 6 | 8 |
| 2 | HB | 4 | 2 -2 -0 | 10 | 5 | 5 | 8 |
| 3 | KÍ | 4 | 2 -2 -0 | 4 | 2 | 2 | 8 |
| 4 | B68 | 4 | 2 -2 -0 | 4 | 2 | 2 | 8 |
| 5 | GÍ | 5 | 2 -2 -1 | 7 | 6 | 1 | 8 |
| 6 | EB/Streymur | 4 | 1 -2 -1 | 6 | 5 | 1 | 5 |
| 7 | FS V | 4 | 1 -1 -2 | 6 | 8 | -2 | 4 |
| 8 | B36 | 4 | 1 -1 -2 | 2 | 4 | -2 | 4 |
| 9 | VB | 4 | 0 -2 -2 | 4 | 9 | -5 | 2 |
| 10 | Skála | 5 | 0 -0 -5 | 1 | 9 | -8 | 0 |

Málmunurin hjá teimum fimm er ymiskur. Men hann hevur størri týdning nú, enn hann fer at hava seinni. Orsøkin er tann, at reglan framvegis er galdandi, sum sigur, at innanhýsis uppgerðirnar telja fyrst, áðrenn málmunurin kemur upp á tal.

Tann helvtin av liðunum, sum eru oddalið, hava ikki enn verið við í so nógvum innanhýsis uppgerðum. Og tað er sjáldsamt, at tær, sum hava verið, eru endaðar við javnleiki. Her verður hugsað um GÍ–NSÍ 1–1, NSÍ–HB 2–2 og KÍ–B68 0–0.

Komandi vikan verður friðarlig, tá ið tað snýr seg um landskappingina. Landsliðið fer til Íslands í dag, og tað verður ikki fyrrenn eftir, at týskararnir um eina viku hava spælt, at eyguni aftur fara at verða snarað ímóti landskappingini. Tá verður ein toppdystur á skránni. Á Skálafjarðarstevnuni, sum fer at verða hildin, meðan teir fara at hava FM kapppróður hinumegin fjørðin, skulu grannarnir av Toftum vitja í Runavík.

B36 skal spæla í Miðvági ímóti FS Vágum. Í hinum trimum dystnum verður annað liðið topplið og hitt eitt av lægru staddu á talvuni: Skála–KÍ, NSÍ–B68, HB–EB/Streymur, GÍ–VB og FS Vágar–B36.

Hóast B36 hevur fingið nógv vánaligari úrtøku fyrstu umførini, enn tað varð roknað við, so kunnu teir á ongan hátt metast at vera avskrivaðir. At tað hava verið so nógvir javnleikir hevur við sær, at einki lið hevur lagt seg avgerandi framum.

Skála tapti aftur mánakvøldið. Teir hava framvegis bara fingið málið, sum Bartal Eliasen skoraði fyri teir í Gøtu. Gongdin hjá Skála minnir um hana í fjør. Tá høvdu teir eftir sjey tey fyrstu umførini bara stigið, sum teir høvdu fingið í 1–1 javnleikinum á heimavølli ímóti B36. Hesa ferð skarst tað verri ímóti B36.

Eftir annað umfarið varð nevnt, at eingin í tí umfarinum hevði vunnið á heimavølli. Aftur hesa ferð vóru heimasigrarnir við undirlutan. NSÍ vann stórt á VB, sum hevur havt stórar trupulleikar higartil. B36 vann á Skála,og hinir tríggir dystirnir endaðu við javnleiki.

Av teimum 21 dystunum, sum higartil eru spældir, eru bara seks vunnir á heimavølli, sjey eru vunnir á útivølli, og tað hevur átta ferðir verið javnleikur. Ofta hevur verið sagt, at tað altíð er torført at spæla á útivølli ímóti KÍ. Úrslitini higartil benda ikki á, at KÍ er betri fyri á heimavølli, enn teir eru á útivølli. KÍ hevur spælt javnt í tveimum royndum á heimavølli, meðan teir hava vunnið tveir útidystir.





*Eftir trygga sigurin í Klaksvík eru tær á Bliki nú farnar undir at fyrireika seg FM-róðurin á Strondum annan leygardag*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Genturnar vardu Argir

**Fyri fyrstu ferð síðani á ólavsøku í fyrraárið eydnaðist tað Bliki av Argjum at vinna genturóðurin**

5–MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*

Blikur við gentumanning vardi Argir á norðoyastevnuni. Teir høvdu vónað, at bæði 6–mannafarið Lómur og 8–mannafarið Argjabáturin fóru at gera um seg og vinna. Tað miseydnaðist, men gentubáturin var fyrstur á mál. Blikur var í hvussu so er fýra bátslongdir frammanfyri Drekan, sum aftur var tað mesta av einari bátslongd undan Havfrúnni, ið vann triðja plássið í stórari kapping við Sílið.

Tað tóktist sum um Havfrúgvin og Sílið fingu besta startin, men tað gekk ikki long tíð, inntil Blikur hevði vunnið sær oddastøðuna, sum tær síðani vardu væl og virðiliga.

– Stýrimaðurin hjá okkum segði, at vit vóru nummar trý, og at Havfrúgvin og Sílið vóru framman fyri okkum. So segði hon, at vit høvdu tikið Sílið, og eftir at hon hevði sagt, at vit vóru farnar framum Havfrúnna, var tað ongantíð nakar ivi um, at vit vóru fremstar, sigur Anna Andresen, sum er bátsformaður á Bliki.

Miðalaldurin umborð á Bliki er átjan ár, og tær flestu hava roynt seg í kapppróðri áður. Sammett við í fjør eru tríggjar nýggjar. Men tað er bara ein, sum ongantíð hevur róð áður. Hinar báðar, sum eru komnar umborð aftur í ár, vóru við í 2001. Tá megnaði Blikur at vinna á ólavsøku, eftir at Fípan Fagra hevði vunnið hinar fimm FM róðrarnar. Í fjør vann Sílið allar róðrarnar.

– Tað varð sagt leygardagin, at vit lógu við tað landið, har tað var slættari at rógva. Tí verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at síggja út annað vikuskifti. Tað vóru tríggir bátar nærri Kósalandinum, enn vit vóru, men úrslitið hjá teimum var ikki so gott, sigur Anna Andresen. Hon og hinar umborð á Bliki eru langt síðani farnar at fyrireika seg til FM kapppróðurin, sum annan leygardag verður á Strondum.

## Úrslit á norðoyastevnu

**5-mannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 05:20:00 |
| 2 | Blikur | 05:39:00 |
| 3 | Havfrúgvin | 05:41:15 |
| 4 | Tjaldrið | 05:42:11 |
| 5 | Fípan Fagra | 05:43:10 |
| 6 | Royndin Fríða | 05:51:07 |
| 7 | Báran | 06:01:12 |
| 8 | Kollur | 06:04:03 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 05:50:18 |
| 2 | Páll Fangi | 06:04:10 |
| 3 | Lómur | 06:10:21 |
| 4 | Smyril | 06:20:15 |
| 5 | Fortuna | 06:44:17 |
| 6 | Fuglfirðingur | 07:08:01 |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 05:49:04 |
| 2 | Drekin | 06:03:06 |
| 3 | Havfrúgvin | 06:06:20 |
| 4 | Sílið | 06:07:21 |
| 5 | Firvaldur | 06:16:17 |
| 6 | Ørnin | 06:23:12 |
| 7 | Fípan Fagra | 06:24:05 |
| 8 | Kollur | 06:41:13 |
| 9 | Junkarin | 06:51:03 |
| 10 | Tjaldrið | 07:23:09 |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 08:25:11 |
| 2 | Jarnbardur | 08:25:12 |
| 3 | Strálan | 08:32:03 |
| 4 | Lómur | 08:33:12 |
| 5 | Sølmundur | 08:36:21 |
| 6 | Gongurólvur | 08:38:19 |
| 7 | Sundabáturin | 08:40:22 |
| 8 | Páll Fangi | 08:41:05 |
| 9 | Snopprikkur | 09:15:19 |

**Áttamannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 7:47:08 |
| 2 | Argjabáturin | 07:54:05 |
| 3 | Kvívíkingur | 08:02:05 |
| 4 | Knørrur | 08:03:07 |
| 5 | Teistin | 08:32:01 |
| 6 | Toftabáturin | 08:38:23 |
| 7 | Gullbrandur | 08:48:03 |

**Tíggjumannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havnarbáturin | 07:37:13 |
| 2 | Eysturoyingur | 07:39:05 |
| 3 | Nólsoyingurin | 07:39:20 |
| 4 | Vestmenningur | 07:43:10 |


Góðir brúktir bilar

Peugeot 306 Diesel
grønur, árg 1996,
km. 155.000, fyrr 75.000,-
nú 70.000

Opel Astra 1.6 Comfort
svartur, árg 1998,
5 hurðar, km. 77.000
95.000

Peugeot 306 Diesel
bláur,
5 hurðar, km. 203.000
65.000

Opel Astra 1.6 Elegance Stc.
gráur, árg 2001, km. 21.000
165.000

Peugeot 306 D 1.9 v/aircon.
bláur, árg 1999,
4 hurðar, km. 61.000, fyrr 115.000,-
nú 100.000

Opel Vectra 1.6 GLi
svartur, árg 1994
4 hurðar, km. 122.000, fyrr 59.000,-
nú 45.000

Peugeot 306 Diesel
bláur, árg 1996
4 hurðar, km. 130.000, fyrr 65.000,-
nú 55.000

Toyota Avensis Sol 2.0 DTI
grønur, árg 1998,
km. 185.000, fyrr 130.000,-
nú 100.000

Peugeot 406 ST 2.1 DT
vínreyður, árg 1997,
km. 195.000
125.000

Ford Escort 1.6 St. car
reyður, árg 1996,
5 hurðar, fyrr 65.000,-
nú 50.000

Peugeot 406 ST 2.1 DT
bláur, árg 1998,
km. 153.000, fyrr 127.000,-
nú 115.000

Ford Escort 1.8
svartur, árg 1998,
5 hurðar, km. 123.000, fyrr 85.000,-
nú 74.000

Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/airc
vínreyður, árg 1999, 4 hurðar
km. 120.000, fyrr 154.000,-
nú 145.000

Kia Sephia 1.5
bláur, árg 1997,
4 hurðar, km. 89.000
55.000

Opel Astra 1.7DT St. car
reyður, árg 1999,
5 hurðar, fyrr 115.000,-
nú 110.000

Ford Sierra 1.8 DT
vínreyður, árg 1993,
4 hurðar
45.000

Opel Astra 1.7DT
bláur, árg 1996,
5 hurðar, km. 159.000, fyrr 52.000,-
nú 45.000

Ford Escort Van 1.8 Diesel
gráur, árg 2000,
3 hurðar, km. 74.000, nýsýnaður
68.000

Opel Astra 1.7DT
grønur, árg 1997,
4 hurðar
65.000

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin 341800





Føroya Koyriskúli

Stanley Olsen tlf. 21 10 99

Nýtt teoriskeið byrjar
týsdagin 10. juni kl. 17.30
á Suðuroyarvegi 11, tlf. 21 10 99
Teldupost: stanley@post.olivant.fo

Sosialurin 341800